# Heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 16. mars 2022 |
| Mál nr.: | 22/02181-11 |
| Málsviðgjørt: | IN |
| Ummælistíð: | 14. – 20. mars 2022 |
| Eftirkannað: | 11. mars 2022 |

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## prístalsviðgerð av tilskoti til tilskotsheimilaðan heilivág

Við heimild í § 18, stk. 6 í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd, sum broytt við løgtingslóg nr. 117 frá 25. september 2013, verður ásett:

**§ 1.** Eru útreiðslurnar innan fyri eitt ár minni enn 543 kr., verður einki tilskot veitt.

**§ 2.** Eru útreiðslurnar innan fyri eitt ár 543 kr. ella størri, er tilskotið:

1) 40% av tí partinum av útreiðslunum, sum er 543 kr. ella størri, men minni enn 1.086 kr.,
2) 60% av tí partinum av útreiðslunum, sum er 1.086 kr. ella størri, men minni enn 2.172 kr.,
3) 75% av tí partinum av útreiðslunum, sum er 2.172 kr. ella størri, men minni enn 5.759 kr.,
4) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum er 5.759 kr. ella størri, og
5) 100% av tí partinum sum er 2.585 kr. ella størri hjá persónum, sum eru fyltir 67 ár, og hjá fyritíðarpensjónistum.

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 194 frá 17. desember 2020 um prístalsviðgerð av tilskoti til tilskotsheimilaðan heilivág.

Heilsumálaráðið, 16. mars 2022

**Kaj Leo Holm Johannesen**
landsstýrismaður

/ Turid Arge